gult6 cyan6 magenta6 svart6

Kanna autismu í Føroyum

Teir báðir sálarfrøðingarnir Ása Ellefsen og Marita Sámalsdóttir Petersen eru farnar undir gransking av autismu í Føroyum. Tær vilja vita, hvussu nógvir teir eru í tali, bústaðarmysntrið hjá autistum og hvussu aldursbýtið er. Tær halda avgjørt, at ein slík gransking hevur ligið á láni í Føroyum

AUTISMA
Stefan í Skorini

Í hesum døgum ferðast tveir ídnir sálarfrøðingar kring landið fyri at kunna um granskingarætlanina, ið teir eru farnir undir. Ása Ellefsen og Marita Sámalsdóttir Petersen fara út á allar fólkaskúlarnar í landinum, har tær tosa við lærararnar.

Tað var meðan Ása Ellefsen og Marita Petersen arbeiddu á Sernámsdeplinum, at tær fingu samband við svian Christopher Gilberg, sum hevur granskað nógv innan autismu í Svøriki. Hann er professari í Gøteborg og í Odense. Hann verður við í granskingini av føroyskum autistum, og tær eru glaðar fyri at hava hann við, tí hann er ein serfrøðingur á økinum. Tær báðar hava verið í Gøteborg fyri at tosa nærri um ætlanina við Gilberg.

– Tað er nú eitt heilt fitt tal av føroyingum, ið hevur fingið diagnosuna autisma í Føroyum. Tí hevði tað verið spennandi at fingið at vita, hvussu nógv tey eru í mun til aðrastaðni, og hvussu viðurskiftini hjá teimum eru á ymiskum økjum, sigur Ása Ellefsen.

Skulu fanga autistarnar

Tær leggja seg eftir at kanna aldursbólkin 7-16 ár. Orsøkin til, at tær júst hava valt henda aldursbólkin er, at vit í Føroyum hava eina so góða skipan, at tað ber til at fáa fatur á øllum børnum í hesum aldursbólkinum. Tað ber tískil til at fáa stóran kunnleika um tey børnini, ið hava autismu. Tí eru góðir møguleikar at lýsa trupulleikan í Føroyum.

Endamálið hjá teimum er at fáa eina heildarmynd av trupulleikanum í Føroyum. Eingin er fyrr farin undir slíka kanning av autistum í Føroyum, og tí er tað alneyðugt at veita foreldrum ta neyðugu kunningina um sjúkuna.

Fyri at fáa vita, hvussu nógvir autistar eru í Føroyum seta Ása og Marita seg í samband við tey fólkini, ið fáast við hesi børnini dagliga. Tað eru serliga serlærarar og heilsusystrar, sum tey hava sett seg í samband við at byrja við.

Eftir hesar forkanningarnar er ætlanin at staðfesta, hvussu nógvir autistar eru í Føroyum.

Størri trupulleiki enn hildið

Tað verður mett, at fýra av túsund fólkum eru autistar. Tí halda tær, at eini 30 til 40 fólk í Føroyum hav autismu. Ætlanin er at staðfesta, hvussu stórt hetta talið er. Fyrr var hildið, at tað bara var 1 av 10.000, sum hevði autismu, men nú er greitt, at hetta talið er størri.

Tí hava sálarfrøðingarnir sett seg í samband við skúlarnar. Ætlanin er at fara út á skúlarnar at kunna allar lærararnar um granskingarætlanina, autismu og eyðkenni fyri autismu. So kann lærarin boða teimum frá, at hann kanska hevur eitt autistiskt barn í flokkinum.

Siðseminevndin er eisini við í leikinum. Enn eru nøvn ikki komin við í granskingina, men so skjótt tær fara at arbeiða við ávísum persónum, so skal Siðseminevndin geva loyvi. Foreldrini hava seinasta orðið, tá talan er um teirra barn, og tí kunnu tey nokta fyri at vera við.

– Tá vit eru lidnar við hesar forkanningarnar, seta vit okkum í samband við foreldrini, sum skulu geva loyvi fyri granskingini, sigur Marita.

Tá er ætlanin at gera samrøður við foreldrini fyri at fáa eina greiðari mynd av autismu í Føroyum.

Tær vænta ikki, at tær verða lidnar við hesar forkanningarnar fyrr enn fyrst næsta ár. Nústani tá ber til at fara undir meira nágreiniliga gransking, sum kanska fer at vera í eini tvey ella trý ár.

Ása og Marita eru privatpraktiserandi sálarfrøðingar, og fáa tí ikki beinleiðis fígging frá tí almenna. Fíggingin til granskingarætlanina fæst við at søkja ymsar grunnar um stuðul, og tær fyrstu krónurnar eru longu komnar inn. Tær leggja tó dent á, at tær ikki fáa nakra løn fyri arbeiðið enn.

Tørvur á vitan

Tørvur er á vitan á hesum økinum í Føroyum, tí tað krevur serligan pedagogikk at fáast við slík børn.

– Tað er áhugavert at fáa staðfest, um munur er á gentum og dreingjum, um trupulleikin er vaksandi, samanbering við onnur lond og hvussu aldurbýtið er, sigur Marita Petersen.

Hetta er eitt brek, sum foreldrini ikki hava ábyrgdina av. Autisma er eitt genetiskt brek, men ætlanin er tó ikki at fara undir nakrar genkanningar.

Tað eru nógv sløg av autismu. Tað eru infantilir autistar, sum ikki fæst samband við, og so eru aðrir, ið eru hampuliga vælvirkandi, men hava torført við at fáa samband við javnaldrar og hava atferðartrupulleikar.

Sálarfrøðingarnir báðir meta, at kanningar og staðfest hagtøl eru ofta við til at betra umstøðurnar hjá menningartarnaðum, og tað er endamálið við granskingini.

Illa frámerkt blokada

Blokadan hjá arbeiðarafeløgunum í Kollafirði er ikki bara ólóglig, men eisini vandamikil. Í ringum sýni sæst hon ov seint, og eingi frámerki eru, so førarar varnast hana

BLOKADA
Stefan í Skorini

Blokadan í Kollafirði kann vera vandamikil í ringum sýni, tí hon ikki er merkt

Mynd: Jens Kr. Vang

Fyri nøkrum døgum síðani ruddaði løgreglan forðingarnar við rundkoyringina í Kollafirði til viks. Løgreglan metti, at hesar forðingarnar vóru ólógligar.

Nú eru fakfeløgini aftur farin at blokera farmaflutningi kring landið. Endamálið er at forða fyri, at verkfalsrakt arbeiði finnur inn í verkfalsrakt øki, og tey meta hetta vera teirra demokratiska rætt.

Illa frámerkt

Tá sýnið er ringt, sum vit hava upplivað seinastu dagarnar við nógvum mjørka í støðum, eru blokadurnar vandamiklar. Førarar verað ikki ávaraðir frammanundan, at forðingar eru á vegnum longur frammi.

Løgreglan sigur, at um nakað stendur á vegnum, so skal tað vera frámerkt, men hetta verður ikki gjørt í hesum førinum.

Í paragraf 28 í ferðslulógini stendur harafturat, at »uttan loyvi frá politivaldi má ongin lutur leggjast ella setast á veg, sum kann vera ferðsluni til bága, uttan so, at serstøk viðurskiftir gera tað neyðugt«.

Flestu føroyingar vita, hvar teir kunnu vænta sær blokadur, men tað er eingin umbering fyri ikki at hava eitt greitt frámerki nakrar hundrað metrar frá blokaduni, so førarar ikki ivast í, hvat teir kunnu vænta sær fyri framman.

Útlendingar, sum ikki hava kunnleika til hesi innanhýsis viðurskifti, kunnu koma illa fyri av hesum, um teir koyra eftir landsvegnum í ringum sýni.

Politiið sigur, at ferðsluløgreglan fer at kanna hesi viðurskifti nærri fyri at vita, um nakað skal gerast.

Arbeiðsgevari koyrdi á blokadufólk

Ein lítil lastbilur hjá J&K Petersen vildi mikumorgunin ikki steðga fyri verkfallsvaktunum við ferjuleguna á Oyrargjógv. Í staðin koyrdi hann beint inn í mannamúgvuna

VERKFALL
John Johannessen

Oyrargjógv: Tað kundi enda við mannskaða, tá ein lítil lastbilur hjá J&K Petersen við sjálvum eigara felagsins handan stýrið mikumorgunin royndi at troðka seg gjørnum verkfallsvaktirnar við ferjuleguna við Oyrargjógv.

Tá lastbilurin, ið var lastaður við stórum dekkum til eina gravimaskinu, skuldi koyra í land av Ternuni, vóru verkfallsvaktirnar skjótar at stilla seg sum ein múr fyri rampuna. Men bilførarin í lastbilinum lætst ikki um vón og setti bara ferð á.

Trongt er á rampuni, og aðrir bilar vóru eisini á veg í land. Tí kundi onkur av verkfallsvaktunum lættliga verðið kleimd. Men hetta hendi tíbetur ikki.

Tá lastbilurin sett ferð á, vóru fleiri verkfallsvaktir, ið fluttu seg. Men nøkur vóru kortini so treisk, at tey løgdu seg fram móti bilinum, so hann ikki fekk koyrt.

Førarin helt kortini á at royna at náa sínum máli. Men tá nakrir mans í treiskni hildu á at standa framman fyri bilin, steðgaði hann til endans. Tá fór hann at royna tosa verkfallsvaktirnar til sættis. Men einki hjálpti, og bilurin varð standandi.

Vágar hava annars ikki verið nógv merktar av verkfallinum. Síðani steðgað varð at blokera við rundkoyringina í Kollafirði, er øll vøra sloppin ótarnað úr Miðstaðarøkinum til Havnar. Tískil vantar ikki vøra í handlunum í Vágum.

Blokaduvaktirnar við ferjuleguna við Oyrargjógv byrjaðu at blokera mikumorgunin klokkan seks, og nú ætla tær sær at halda fram, siga tær.

Hesin lastbilurin hjá J&K Petersen royndi mikumorgunin at trumla seg gjøgnum verkfallsvaktirnar við Oyrargjógv. Men tað eydnaðist kortini vaktunum at fáa hann at steðga.

Mynd: John Johannessen

Landsbankastjórin:

Verkfallið er ikki vanlukka

Vit eru langt burtur frá eini støðu, har verkføll í Føroyum fáa vanlukkuligar fylgjur. Hetta staðfestir landsbankastjórin, sum kortini ásannar, at verkfallið kann vera ein smeitur fyri alarar og fiskikip

VERKFALL
John Johannessen

Álvarsamastu fíggjarligu fylgjurnar av verkfallinum á privata arbeiðsmarknaðinum merja alarar og fiskimenn. Men verkfallið er ikki ein vanlukka.

Hetta staðfestir Sigurd Poulsen, landsbankastjóri.

- Eg havi ikki upplýsingar um, hvussu nógv arbeiðspláss liggja still av verkfallinum. Tílíkar upplýsingar hava Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Og tey hava helst eisini hvør í sínum lagi metingar um kostnad.

- Men eftir mínum tykki kann mest álvarsligi kostnaðurin liggja í alivirkjum, um fiskur doyr. Harafturat kann verkfallið eisini kosta fiskiskipum, tí tey fáa vánaligan prís, av tí at so fá virki taka ímóti, sigur landsbankastjórin.

Kann halda á

Landsbankastjórin sigur seg ikki kunna meta um, hvussu leingi verkfallið kann halda á, áðrenn tað fær vanlukkuligar fylgjur fyri samfelagið. Men hann heldur, at vit eru langt burtur frá eini støðu, har talan kann verða um vanlukkuligar fylgjur.

- Føroyingar plaga at søkja semju langt áðrenn tað kemur so langt, at verkfallið fær álvarsligar fylgjur, sigur Sigurd Poulsen.

Vit spyrja landsbankastjóran, um tað ikki kann fáa avleiðingar fyri búskapin og kappingarføríð, um lønirnar hækka, og hvussu nógv lønirnar kunnu hækka.

- Frá einum teknokratiskum sjónarhorni er tað í lagi, at lønirnar økjast tað, sum framleiðslan økist. Um búskapurin hevur eina annars góða javnvág, so heldur hann fram at hava hesa góðu javnvág, tá lønirnar laga seg soleiðis. Tíverri eru hagtøl um føroyska framleiðslu ikki so góð, at tal kann setast á hetta frá teirri støðu, sum eg siti í, greiðir Sigurd Poulsen, landsbankastjóri, frá.

Samráðingarspurningur

Landsbankastórin ger greitt, at lønarspurningurin kortini ikki er ein teknokratiskur spurningur.

- Tað er heldur ein spurningur, har partarnir á arbeiðsmarknaðinum taka ábyrgd fyri teirri ávikan, sum lønin hevur á búskapin og hansara evni at klára seg í framtíðini, sigur Sigud Poulsen. Landsbankastjórin vísir samstundis á, at samráðingarstøðan tó eisini hevur týdning.

- Tað veldst í stóran mun, um eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi er stórur ella lítil. Er stórt trýst á búskapin, kanst tú lættliga fáa heldur stóran vøkstur í lønum. Og fyri pressinum á búskapin eru partarnir ikki einaráðandi, sjálvt um teir hava ávirkan, tí úrslitið av samráðingunum fær nevniliga eisini ávirkan á eftirspurningin til nýtslu, sigur landsbankastjórin.

Løgtingið hevur verið slakt

Sigurd Poulsen vísir á, at tað millum annað er ein uppgáva fyri búskaparpolitikkin, at atlit verða tikin til jávnvágina í búskapinum. Hesa uppgávuna, heldur hann, at løgtingið ikki hevur tikið í álvara í seinastuni.

- Løgtingið átti ikki at játta avgjaldslækkingar í eini tíð, tá trýst er á búskapin og arbeiðsloysið er minni, enn tað hevur verið leingi. Løgtingið hevur ikki gjørt tað lættari hjá pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, við at stuðla øking í eftirspurninginum, staðfestir Sigurd Poulsen, landsbankastjóri.

FCK - Brøndby
í Ítrottarparkini 10. juni kl. 15.00

Úr Føroyum 7. juni kl. 20.40
aftur 11. juni kl. 09.00

Prísur: kr. 1.995,-
við algongumerki og ferðaavgjaldi.
Avmarkað nøgd.

North Atlantic Football Agency
í samstarvi við Atlantic Airways

ATLANTIC AIRWAYS
Tel. 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

gult7 cyan7 magenta7 svart7